## Bláa húsið í Smærugøtu

*Bláa húsið í Smærugøtu*
*Bláar rósur í vindeygunum*
*Heit blá hjørtu sláa eymt*
*Úti er kalt og vindar blæsa*
*Ein óvinarligur gjóstur merkist.*

*Lívsins skuggasíða er døpur*
*Eingin velur sjálvur at liva har*
*Í tí bláa blómugarði vaksa rósur*
*Vakrar bláar og viðbreknar eru tær*
*Fyri urtagarðsmanninum eru tær alt*
*Leggur lív og sál í at lívga og verja*
*Øll eiga pláss og lív her í verð.*

*Reyðar bláar og hvítar rósur*
*Ein sera vøkur sjón fyri øll eygu*
*Okkara dýru litir í krossmerkinum*
*Veitrar fyri gleði og svárari sorg*
*Fylgissveinur gjøgnum foldarlívið.*

*Tak bláu rósurnar burt í Smærugøtu*
*Tak bláu luftina burtur og anda*
*Tak bláa litin úr Merkinum og vita*
*Um vit eru eitt livandi ella deytt fólk?*
*Bláa húsið í Smærugøtu má til*
*Skulu vit nevnast eitt livandi fólk*
*Har reyðar bláar og hvítar rósur vaksa.*

**Rituvík: Eyðálvur Kári Nielsen**

## Leiðin til styrkt kappingarevni

VEITARASAMTØK
*Tíðindaskriv*

Eftir umbøn frá vinnuni skipar TK Stovan, í samstarvi við Føroya Handverksmeistarafelag og havnar- og menningarstjóranum í Klaksvík, Rana Nólsøe, fyri skeiði, sum lýsir møguleikarnar í Veitarasamtøkum.

Eitt veitarasamtak er til dømis, tá nøkur virkir ganga saman í eitt samtak og bjóða uppá eina størri verkætlan (entreprisu), sum tey hvør sær eru ov lítil at klára. Møguleikar fyri at gera veitarasamtøk í Føroyum eru innan nógvar vinnugreinar. Til dømis innan byggivinnuna og oljuvinnuna, har nógvar uppgávur eru stórar í mun til, hvat føroysk virkir megna við teirra fáu starvsfólkum og avmarkaðu fíggjarligu styrkum.

Millum annað verða hesi evni umrødd:

- Møguleikar í einum veitarasamstarvi
- Spælireglur í einum veitarasamstarvi
- Tilrættaleggjan av einum veitarasamstarvi
- Ymiskir samstarvshættir
- Leiðsla av einum veitarasamstarvi

Skeiðleiðararnir eru Kristin Balslev Munksgaard, forskningsassistent, Jane Vestergaard Møller, forskningsassistent, Torben Damgaard, lektor, Poul Rind Christensen, professor og Mette Schmidt, amanuensis frá Syddansk Universitet. Teir hava, saman við vinnuni í Suðurjútlandi og á Fjóni (tí sokallaða tríkantsumráðnum), arbeitt nógv við ymiskum modellum og møguleikum fyri veitarasamtøkum. Syddansk Universitet hevur evnað nøkur amboð til smá og miðalstór virkir at brúka í veitarasamtøkum. Á skeiðinum fáa luttakandi virkir kunning um, hvussu tey kunnu nýta hesi amboð.

**Eitt hugsað dømi:**
Ein stórur bygningur skal byggjast í Suðri. Ongin EL- ella HSV- innleggjari er so mikið stórur í Suðri, at hann einsamallur kann átaka sær arbeiðið. Tí ferð arbeiðið til eitt størri virki frá meginøkinum, ella entá til eitt útlendskt virki, tí ongin í Føroyum hevur nóg góð kappingarevni og nóg góðan førleika.

Ein loysn kundi verið veitarasamtøk millum føroysk virkir við tí endamáli at betra um kappingarevni og førleikan mótvegis størru virkjunum.

Meira kann lesast á heimasíðuni www.tk.fo

VIÐMERKINGAR

# Tunnil Øravík-Hov og samferðsluhavnin í Vági

**– og amanvevjing landsstýrismansins í vinnumálu m av hesum málum**

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



Politisk telving tá ið hon er beroknandi og ísakøld við tí fyri eyga at fløkja alt upp í ein ellibita og so sita eftir við einum úrsliti, har ein sleppur frá at seta nakran pening av til eitt ávíst øki - tað er tað, sum Bjarni Djurholm og hansara menn ætla at gera, nú hestarnir eru farnir at bítast, tí krubban er um at verða tóm!!!!!

Lyftini til ung sum eldri, lógarfestar ætlanir og framtíðar løgu ætlanir, sum skulu haldast, vísa seg nú at verða sera truplar at fáa at ganga upp í eina størri eind, tí tær milliardaupphæddirnar, sum tosað hevur verið um, at andstøðan kundi mala rundanum og nýta sjónina av men sum vit ikki skuldi fáa loyvi til at forkoma nýtist ikki okkara hjálp til - tað hevur samgongan so sanniliga sjálv klárað!!!

Teir seinastu dagarnir hevur verið nógv tosað um eitt mál, sum undirritaði saman við Hendrik Old hava reist í tinginum viðv. útbyggingini av Vágs Havn, sum var samtykt við eini stuðulslóg á Føroya Løgtingi tann 26. mars 2002 - altso árðrenn valið 2002 við 28 stemmum fyri 3 blonkum og ein sum ikki avgreiddi atkvøðu, tí viðkomandi var burturstaddur.

Málið er politiskt avgreitt sum sæst við stórum meiriluta, men orsakað av nøkrum »tekniskum justeringum« sum neyðugt er at gera, vil eg hervið greiða eitt sindur frá málinum, so vanlig fólk sum kanska ikki kenna so væl til málið fáa eitt sindur betri fatan av tí.

**Gongdin er henda:**
Uppskot til løgtingslóg um stuðul í mesta lagið 18,5 mió kr.til at útbyggja havnina í Vági bleiv samtykt við løgtingslov nr. 45 frá 26 marts 2002.

Tað vóru 28 atkvøður fyri og 3 blankar atkvøður - Kári P. Højgaard, Katrin Dahl Jacobsen og Anita á Fríðriksmørk atkvøddu blankt - ein atkvøddi ikki.

Eina partur av viðmerkingunum í samband við lógaruppskotið og málsviðgerðina vóru m.a. at tryggja, at málið skuldi fáa eina nøktandi politiska viðgerð, áðrenn avgerðin at fremja verkætlanina bleiv tikin og eins og fyri at geva løgtinginum innlit í málið.

Í ørðum føri er ásett í játtanarskipanini, at tá talan er um størri íløgur, sum ofta fevna um fleiri fíggjarár, er meginreglan, at serstakt lógaruppskot verður lagt fyri Løgtingið.

Sambart játtanarskipanini er neyðugt við serstakari lóg um byggingina, um landsstýrismaðurin skal kunna gera avtalur, sum hava við sær byggiútreiðslur fyri komandi fíggjarárum eisini.

Hendan lógin (stuðulslógin) er samtykt av allari samgonguni sum sat seinasta valskeið við undantaki av tveimum limum, ið atkvøddu blankt.

Víðari í somu viðmerkingum til stuðulslógina verður eisini sagt:

Ætlanin er at gera bindandi avtalu við Vágs Kommunu um felags verkætlanina, og er tað ein fortreyt fyri at binda landið fíggjarliga í fleiri ár , í eini slíkari avtalu, at ein verklagslóg er samtykt!!!!

Í løgtingslóg nr. 82 frá 15 mai 2001 um fólka og farmaflutning er ásett at siglast skal á Vág og tað liggur tí á landsstýrismanninum at skipa soleiðis fyri at havnarviðurskiftni í Vági er nøktandi - eisini hjá nýggja suðriarskipinum.

Hetta er ikki eitt mál sum einans hevur ligið sum áhugamál fyri Vágs kommunu at fáa loyst úr lagdi, men so sanniliga eisini hjá Landsstýrinum, tí sambært skrivið frá 8. august 2001 fekk kommunan svar frá vinnumálastýrinum, har skotið var upp at kommunan, vinnumálastýrið / landsverkfrøðingurin samstarvað um eina felags verkætlan,- og á fundi millum landsverkfrøðingin og Vágs Býráð tann 13 sept. 2001 var síðan avtalað at landsverkfrøðingurin skuldi gera eitt tilmæli um hvussu samferðslu-viðurskiftini kunnu verða loyst á frægasta hátt.

Í Dec. 2001 fekk vinnumálastýrið eina frágreiðing við niðurstøðu frá landsverkfrøðinginum um havnaviðurksiftini í Vági.

Á landstýrisfundi fyrst í Februar 2002 fekk landsstýrismaðurin undirtøku fyri at søkja um játtan til at fremja tað loysn, - har atløguplássið hjá nýggja Suðriarskipinum verður gjørt sum ein partur av einari heildarloysn í samstarvið við Vágs Kommunu, tó at kostnaðurin í mesta lagi skuldi verða helvtin av øllum kostnaðinum, og ikki meira ein 18,5 mio kr.

Hetta er tað sum er samtykt tann 15. marts 2002 og bleiv til lóg nr. 45 frá 26. marts 2002.

Tað skal viðmerkjast, at upprunaliga ætlanin hjá Vágs kommunu var at byggja eina Djúphavn, men vinnumálastyrið metti tað skilabetri at fremja eina felags verkætlan, har samferðsluhavnin eisini var ein partur av ætlanini, og at landið skuldi standa fyri verkætlanini, til hon var liðug, tvs. projektering, útbjóðing og bygging.

Hvat er síðani hendt í málinum?

Tað hevur alla tíðina síðan stuðulslogin bleiv samtykt og seinni í viðmerkingunum í henni verið gjørt vart við frá umsitingini á løgtingsskrivstovuni , at ein verklagslóg var neyðug fyri at Landstýrið sum byggiharri kundi takað ábyrgdina av verkætlanini herundir fíggjarliga váðanum í byggitíðini , so skuldi ein verklagslóg gerast, sum skuldi avloysað løgtingslóg nr. 45 frá 2002,- sum er stuðulslógin.

Og tað er just tað sum hetta uppskotið snýr seg um.

Ein av viðmerkingunum frá umsitiningi er tann um hvør ber váðan við einum evt. meirkostaðnaði um hesin skuldi uppstaði í byggitíðini av einari ella arðari orsøk, - her meti eg, at alneyðugt er við so grundigum forarbeiði at slíkt ikki kemur fyri, og um neyðugt, at gera eina fastprís avtalu, sum álagt verður landstýrismanninum at syrgja fyri verður yvir hildin.

Nevnast skal eisini her at undirritaði hevur fingið ein yvirslagsprís uppá ætlanina sum ,sigur at kostnaðurin verður 30-32 mio. og ikki 37,5 sum vænta og kann hetta eisini verða gjørt sum ein fastprísavtala.

Tað sum eisini verður verður biði um at fáa gjørt í samband við verklagslógina, er at fáa flutt stuðulsjáttanina uppá krónur 500 túsund, yvir til at verða ein verklagsjáttan til projektering.

Hetta er ikki nakar eykakostnaður, men ein flyting frá eini játtanarkonto til arða.

Fyri at fáa greiðar linjur og ábyrgdarfordeiling í byggitíðini, so er handan verklagslóg neyðug, og vóna vit at tikið verður undir við henni, - tí hon førir ongan meirkostnað við sær í mun til upprunaligu stuðulsjáttanina, hetta er einans ein spurningur um ábyrgdina av ætlanini frá byrjan til arbeiði er liðugt.

Hetta skuldi veri gjørt við upprunaligu lógini, men málið bleiv sum øllum kunnugt skunda ígjøgnum uttan at verða endaliga viðgjørt í vinnunevndini og endaði í marts aftur í løgtinginum til endaliga avgreiðslu.

Tað at Bjarni Djurholm nú byrjar at trúða okkum við at um havnin í Vági skal gerast, ja so verður ongin tunnil kunnu vit ikki takað fyri fult,- tí tunnilin er sum øllum kunnugt við í langtíðar løgu ætlan landsstýrisins og skal byrja seinast 2004 og hesum vilja vit halda Bjarna Djurholm fastan við at halda seg til.

Hinvegin, - at úttalað seg so dundrandi óseriøst sum tað bleiv gjørt í sjónvarpinum av vinnumálaráðharranum fyri vikum síðani viðv. hesum málið haldi eg er langt úti, - havandi í hugað at tunnilin Hov - Øravík nokk kostar 80-90 mio kr. og tað sum skal gjaldast av landium til Vágs Havn er ivaleyst maksimum 14-16 milliónir, so havandi hetta í hugað, er spurningur um tunnilin byrjar hálvt ár fyrr ella seinni.

Bjarni Djurholm lovaði frá Tingsins røðarapallið í næstseinastu viku, at útgerðin skuldi flyast frá Gásadals tunnlinum og til suðriar tá liðugt var at borað ígjøgnum til Gásadals.

Nú løgtingslimir hava verið á vitjan í suðri hava teir eisini sæð hvat er gott í suðri og hvat krevur stórar ábøtur og vóni eg at viljin eisini er til staðar at fremja ábøturnar tá hartil kemur.



UTTAN ÚR HEIMI

# Kann enda við nývali í Svøríki

**Í dag kann Gøran Persson gerast tann fyrsti svenski forsætisráðharrin, sum fær misálit í ríkisdegnum**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*

Svenski ríkisdagurin fer í dag at atkvøða um eitt uppskot um misálit á ta sosialdemokratisku stjórnina hjá Gøran Persson, forsætisráðharra. Tað er Hóvligi Savningarflokkurin, sum hevur lagt uppskotið fram, og sum er bendir alt á, at allir flokkar uttan sosialdemokratarnir fara at taka undir við tí.

Eygleiðarar í Stockholm eru á einum máli um, at hurlivasi er í teirri politisku støðuni eftir valið tann 15. september. Nýval kann vera ein loysn. Síðani 1971 hevur lógin heimilað nývali, men higartil hevur tann reglan ongantíð verið nýtt.

Valúrslitið tann 15. september gav sosialdemokratunum og Vinstra-flokkinum 174 av teimum 349 tingmonnunum. Sostatt restaði ein tingmaður í, at teir báðir flokkarnir fingu meiriluta, og tað bar í sær, at Umhvørvisflokkurin gjørdist tungan á vágskálini. Ta støðuna hevur flokkurin eisini nýtt til fulnar seinastu fjúrtan dagarnar, og flokkurin hevur m. a. kravt at fáa sæti í stjórnini aftur fyri at stuðla Gøran Persson.

Men sosialdemokratiski formaðurin hevur verið líka avgjørdur og hevur blankt víst kravinum hjá Umhvørvisflokkinum aftur. Tað hevði við sær, at Umhvørvisflokkurin fór at tosa við fýra av teimum borgarligu flokkunum ístaðin fyri, men heldur ikki her kom nakað burturúr, og seinasta fríggjadag slitnaðu tær samráðingarnar. Moderatarna vórðu ikki bodnir við í hesar samráðingarnar.

Tá so samráðingarnar millum sosialdemokratarnar, Vinstraflokkin og Umhvørvisflokkin slitnaðu sunnudagin, legði Hóvligi Savningarflokkurin uppskot fyri ríkisdagin um misálit á stjórnina hjá Gøran Persson.

- Ein minilutastjórn, sum ikki hevur meirilutan aftan fyri seg, eigur at fara frá, segði formaðurin í Hóvliga Savningarflokkinum, Bo Lundgren, tá hann legði uppskotið fram.

### Hevur bestu kortini

Eygleiðarar í Stockholm vænta, at verður uppskotið um misálit samtykt, fer Gøran Persson at skipa eina nýggja minnilutastjórn um nakrar dagar. Ein borgarlig stjórn við stuðli frá Umhvørvisflokkinum, men uttan Moderatarna, hevði bert havt 120 tinglimir aftan fyri seg, og tí er tað Gøran Persson, sum situr við teimum bestu kortunum, sjálvt um stjórn hansara fær misálit í dag.

Nýval er sum nevnt ein møguleiki, og júst tann møguleikin kann gerast bjargingin hjá sosialdemokratisku stjórnini, tí Umhvørvisflokkurin er neyvan serliga hugaður fyri einum vali júst nú. Flokkurin liggur beint oman fyri minstamarkið, sum er fýra prosent, og tað er alment kent, at flestu veljararnir hjá flokkinum vilja hava eina sosialdemokratiska stjórn heldur enn eina borgarliga. Tí er ivasamt, um Umhvørvisflokkurin torir at fella stjórnina hjá Gøran Persson.

# Kríggj er ikki loysnin

**Tríggir amerikanskir kongresslimir, sum eru á vitjan í Irak, mæla stjórnini í Washington til at bíða við álopsætlanini og heldur geva irakum ein møguleika**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*



*Tríggir amerikanskir kongresslimir halda, at vápnaeftirlitsmenninir eiga at fáa ein møguleika, áðrenn tosað verður um at leypa á Irak. Her tingast ST og Irak um tað ætlaða eftirlitið. Fremst t. v. formaðurin hjá eftirlitsmonnunum, sviin Hans Blix*

*Mynd: Reuters*

Teir tríggir kongresslimirnir, Jim McDermott úr Washington, David E. Bonior úr Michigan og Mike Thompson úr Kalifornia, hava á vitjanini hitt fleiri irakskar leiðarar, teirra millum varaforsætisráðharran Tariq Aziz og uttanríkisráðharran Naj Sabri.

Teir tríggir kongresslimirnir siga seg hava fingið váttan fyri, at vápnaeftirlitsmenninir hjá ST fáa frítt at fara í Irak, so leingi teir virða landsins sjálvræði og átrúnað.

- Boð okkara til ta iraksku stjórnina og til okkara egnu stjórn eru greið. Kríggj er ikki loysnin. Tað eru aðrir hættir at loysa hetta málið, segði David Bonior í Bagdad í gjár.

Teir tríggir kongresslimirnir, sum allir eru demokratar, siga seg bera ótta fyri, at amerikanska hóttanin um at nýta vápnamegi fer at darva arbeiðnum hjá vápnaeftirlitsmonnunum. Teir tríggir halda, at USA og ST-trygdarráðið eiga ikki at leypa framav, men at tað er rættari at bíða og vita, um eftirlitsmenninir hjá ST fáa frítt at fara, soleiðis sum irakar hava lovað.

Republikanararnir í USA eru sum vera man ikki fegnir um Bagdad-ferðina hjá teimum trimum demokratisku kongresslimunum.

- Tá amerikanskir kongresslimir í Bagdad siga, at amerikanski forsetin villleiðir amerikanska fólkið, er talan um eitt álvarssamt mál, segði republikanski senatorurin Don Nickles í gjár. Ein av teimum kendu republikansku senatorunum, John McCain, heldur ikki, at Saddam Hussein fer at geva ST-vápnaeftirlitsmonnunum frítt at fara, og somu áskoðan hevur republikanski leiðarin í senatinum, Trent Lott.

George W. Bush, forseti hevur fyrr funnist at teimum demokratisku kongresslimunum, sum mæla USA frá at leypa á Irak.

## Fjala seg í Svøríki

Bretska sjónvarpið BBC vil vera við, at Svøríki er tað landið, har tað er lættast hjá yvirgangsmonnum at fjala seg.

Í sendingini Newsnight mánakvøldið varð sagt, at Svøríki er eitt reiður hjá yvirgangsmonnum. Víst varð á málið um tann 29 ára gamla mannin, sum varð tikin í Svøríki fyri einum góðum mánað síðani, tá hann var umborð á eitt flogfar við einari skammbyrsu. Mánadagin varð maðurin latin leysur.

- Sama hvat maðurin ætlaði at nýta vápnið til, tykist Svøríki hava álvarssamar trupulleikar við at handfara yvirgang. Tað er tí ikki so løgið, at landið leingi hevur verið mett sum tað tryggsata skjólið hjá yvirgangsmonnum, varð sagt í sendingini.

## Fyri og ímóti Blair

Landsfundurin hjá bretska arbeiðaraflokkinum gav Tony Blair, forsætisráðharra stuðul til at leypa á Irak, men fundurin kolldømdi ætlanina hjá stjórnini at einskilja almennar uppgávur.

Blair hevur alla tíðina sagt, at hann tekur undir við ætlanini hjá amerikanska forsetanum, George W. Bush, at leypa á Irak og at fáa Saddam Hussein frá, og á landsfundinum fekk forsætisráðharrin stuðul frá 60 prosentum av luttakarunum.

Men tá fundurin atkvøddi um ætlanina hjá stjórnini at einskilja almennar uppgávur, fekk stjórnin ein frammaná. Heili 67 prosent av fundarfólkinum atkvøddu ímóti ætlanini. Hetta er fyrstu ferð í átta ár, at Tony Blair hevur havt meirilutan av einum landsfundi hjá Labour ímóti sær.

## Røkke aftur »fátækur«

Kendi norski ríkmaðurin Kjell Inge Røkke hevur mist so stór virði tey bæði seinastu árini, at hann er nú líka "fátækur", sum tá hann kom aftur til Noregs í 1993 eftir at hava búð í USA.

Eitt yvirlit yvir múgvandi norðmenn vísir, at ognirnar hjá Kjell Inge Røkke eru verdar umleið 1,9 milliard krónur. Fyri tveimum árum síðani var virðið um seks milliardir krónur.

Høvuðsorsøkin til tann stóra munin er fallið á partabrøvunum í stórfyritøkuni Kværner. Sjálvur heldur Røkke, at ognir hansara eru meiri verdar, enn yvirlitið sigur.

## Fáa sær fartelefon

Nógv eldri fólk í Danmark fáa sær nú fartelefon. Handlarnir siga, at umleið 20 prosent av teimum, sum nú keypa fartelefon, eru eldri enn 60 ár.

Í einum handli í Keypmannahavn, sum selur fartelefonir, siga tey, at áhugin er støðugt vaksin seinastu tvey árini. Tá vóru bert fimm prosent av viðskiftafólkunum eldri enn 60 ár, men í dag halda tey, at næstan 40 prosent av teimum, sum fáa sær fartelefon, eru oman fyri tey 60.

Donsku eldrafeløgini siga, at tað eru tvinnar orsøkir til, at nógv eldri fólk keypa sær fartelefon. Onnur er, at nógv eldri eru einsamøll, og hin er, at fólk kenna seg tryggari við einari fartelefon, skuldi okkurt borist á.